# HM2010



# Forlán besti spælarin



**HM2010** Hóast Uruguay einki heiðursmerki fekk, bleiv Diego Forlán kosin besti spælari, og týski Thomas Müller bleiv toppskjútti, hóast tríggir aðrir skutu líka nógv mál

Hilmar Jan Hansen

Stóra stjørnan á landsliðnum hjá Uruguay, Diego Forlán, skoraði fleiri av vakrastu málunum í hesum HM-endaspælinum, og hann fekk eisini flestar atkvøður, tá tíðindafólk skuldu velja ein millum tiggju spælarar, FIFA hevði innstillað til heiðurin sum besti spælarin.

Forlán fekk 23,4 prosent av atkvøðunum, meðan hollendski Wesley Sneijder fekk 21,8 prosent og spanski David Villa 16,9 prosent. Sostatt vann Forlán gylta bóltin, ið besti spælarin fær, og hinir báðir fingu ávikavist ein silvur- og bronsubólt.

### Müller toppskjútti

Thomas Müller og hinir á týska landsliðnum komu ikki í HM-finaluna, men hann kann ugga seg við, at hann eftir sítt fyrsta HM-endaspæl kundi taka við sær heim gylta skógvin, sum er heiðurin hjá toppskjúttanum í HM-endaspælinum.

Müller, sum eisini var yngsti spælari í kappingini, skoraði fimm mál tilsamans. Tað var hann ikki einsamallur um, men av tí at hann legði upp til fleiri onnur mál, enn nakar av hinum kandidatunum, fekk hann heiðurin sum toppskjútti.

David Villa úr Spania fekk silvurskógvin og Wesley Sneijder úr Hollandi bronsuskógvin. Fjórði maðurin, ið var um boðið, var Diego Forlán, men av tí at spælararnir við fægst minuttum á vøllinum komu framum, gjørdist hann tann skóleysi av teimum...

Spanski málverjin og liðformaðurin, Iker Casillas, fekk gylta handskan sum besti málverji í kappingini.

# OKKARA **HM-LIÐ**

*Ítróttarredaktiónin á Sosialinum hevur mett hesar leikarar, sum teir ellivu bestu undir HM-endaspælinum í Suðurafrika*




Uppstilling: **4-3-3**



## *Allar HM-finalurnar*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1930 | Uruguay-Argentina 4-2 | 1978 | Argentina-Holland 3-1 *(eftir umdyst)* |
| 1934 | Italia-Tjekkoslovakia 2-1 *(eftir umdyst)* | 1982 | Italia-Vesturtýskland 3-1 |
| 1938 | Italia-Ungarn 4-2 | 1986 | Argentina-Vesturtýskland 3-2 |
| 1950 | Uruguay-Brasil 2-1 | 1990 | Vesturtýskland-Argentina 1-0 |
| | *(Ikki finala, men avgerandi dystur í bólkaspælinum)* | 1994 | Brasil-Italia 0-0 |
| 1954 | Vesturtýskland-Ungarn 3-2 | | *(3-2 til Brasil eftir umdyst og brotsspørk)* |
| 1958 | Brasil-Svøríki 5-2 | 1998 | Frakland-Brasil 3-0 |
| 1962 | Brasil-Tjekkoslovakia 3-1 | 2002 | Brasil-Týskland 2-0 |
| 1966 | Ongland-Vesturtýskland 4-2 *(eftir umdyst)* | 2006 | Italia-Frakland 1-1 |
| 1970 | Brasil-Italia 4-1 | | *(5-3 til Italia eftir umdyst og brotsspørk)* |
| 1974 | Vesturtýskland-Holland 2-1 | 2010 | Spania-Holland 1-0 *(eftir umdyst)* |